# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Vit vilja fyrst og fremst reisa okkum eftir dygga ósigurin í Íslandi*
*Tróndur Vatnhamar, HB*

# Startrøðin á ólavsøku



*Nú er so staðfest, hvussu startrøðin á ólavsøkuróðrinum verður*
*savnsmynd*

**FM-heitini eru fyri tað mesta avgjørd, men fyri tað er spenningurin um ólavsøkuróðurin stórur millum ymsu bátsmanningarnar**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast flestu FM-heitini eru avgjørd, longu áðrenn fyrstu tøkini verða tikin á ólavsøkuróðrinum, so er ikki heilt frítt, at spenningurin er stórur kortini. Ofta verður tikið til, at ólavsøkuróðurin hevur at kalla eins stóran týdning sum sjálvt FM-heitið, og tí er eingin ivi um, at nógv eisini verður lagt fyri, hóast FM er avgjørt.

Tað er bara í gentu- og dreingjaróðrinum, at gullið ikki er heilt avgjørt, men heldur ikki í hesum róðrunum er spenningurin tann heilt stóri. Hinvegin er spenningurin um Útvarpssteypið so stórur, sum hann sjáldan hevur verið tað. Tríggjar manningar hava enn fult stigatal, og kunnu tær tí allar vinna steypið. Reglurnar siga, at eru fleiri bátar, sum hava eins nógv stig, fer steypið til tann bátin, sum hevur havt vakrasta róðurin á ólavsøku. So tað snýr seg kanska ikki bert um at rógva skjótt hesaferð.

Startrøðin til róðurin er fastløgd. Hendan er sett efir, hvussu bátarnir stóðu seg á seinastu FM-stevnuni, og framgongur hon niðanfyri.

## FM-kappróður

| 5-mannafør, dreingir | Stig íalt |
|---|---|
| 1 Havfrúgvin | 38 |
| 2 Sílið | 32 |
| 3 Teistin | 20 |
| 4 Tjaldrið | 14 |
| 5 Jallurin | 11 |
| 6 Junkarin | 9 |
| 7 Jomfrúgvin | 3 |
| 8 Blikur | 3 |
| 9 Drekin | 2 |
| **6-mannafør, kvinnur** | |
| 1 Jarnbardur | 42 |
| 2 Kollfirðingur | 28 |
| 3 Lómur | 18 |
| 4 Smyril | 8 |
| 5 Hvessingur | 2 |
| **5-mannafør, gentur** | |
| 1 Hvassi | 40 |
| 2 Tambar | 28 |
| 3 Drekin | 28 |
| 4 Ørnin | 15 |
| 5 Blikur | 13 |
| 6 Teistin | 8 |
| **5-mannafør, kvinnur** | |
| 1 Sílið | 35 |
| 2 Ørnin | 28 |
| 3 Fípan Fagra | 25 |
| 4 Frúgvin | 22 |
| 5 Ritan | 12 |
| 6 Teistin | 9 |
| 7 Jallurin | 1 |
| **6-mannafør, menn** | |
| 1 Sundabáturin | 40 |
| 2 Tvørabáturin | 30 |
| 3 Strálan | 26 |
| 4 Jarnbardur | 17 |
| 5 Lómur | 7 |
| 6 Riddarin | 5 |
| 7 Sølmundur | 5 |
| 8 Rádni | 2 |
| **8-mannafør** | |
| 1 Heiðabáturin | 42 |
| 2 Argjabáturin | 29 |
| 3 Ørvur | 21 |
| 4 Árnfirðingur | 20 |
| 5 Knørrur | 14 |
| **10-mannafør** | |
| 1 Eysturoyingur | 42 |
| 2 Vestmenningur | 30 |
| 3 Havnarbáturin | 12 |

**5-mannafør, dreingir**
5 Blikur
6 Tjaldrið
7 Junkarin
8 Sílið
9 Havfrúgvin
10 Teistin
11 Jallurin
12 Drekin

**6-mannafør, kvinnur**
8 Kollfirðingur
9 Jarnbardur
10 Lómur

**5-mannafør, gentur**
Ørnin
Teistin
8 Tambar
9 Hvassi
10 Drekin
11 Blikur

**5-mannafør, kvinnur**
5 Erla Kongsdóttir
6 Teistin
7 Ritan
8 Sílið
9 Ørnin
10 Fípan Fagra
11 Frúgvin
12 Jallurin
13 Blikur

**6-mannafør, menn**
5 Kollfirðingur
6 Lómur
7 Jarnbardur
8 Tvørabáturin
9 Sundabáturin
10 Strálan
11 Riddarin
12 Rádni

**8-mannafør**
7 Ørvur
8 Argjabáturin
9 Heiðabáturin
10 Árnfirðingur
11 Knørrur

**10-mannafør**
8 Vestmenningur
9 Eysturoyingur
10 Havnarbáturin

## Kann fáa trý ára fongsul



Rættarmálið móti 29 ára gamla manninum, sum rann inn á vøllin, tá Danmark spældi móti Svøríki, kann nú byrja. Ákæruritið er skrivað, og verður maðurin ákærdur fyri tvey lógarbrot. Harðskap og fyri at fara inn á ítróttarøkið í Parkini uttan loyvi.

Sambært revsulógini kann ein persónur, sum verður dømdur fyri harðskap, fáa upp til trý ára fongsulsrevsing, men tá tann álopni – dómarin – ikki fekk nakað mein, verður talan neyvan um fulla revsirammu.

Hjá DBU verður sagt, at tey eru nøgd um ákæruritið.

Eg haldi, at hetta prógvar, at rættarskipan okkara virkar, sum hon skal, sigur Lars Berendt, kunningarstjóri hjá DBU, við danskar miðlar.

Umframt rættarmálið hevur DBU eisini reist endurgjaldskrav móti 29 ára gamla manninum. DBU fær við vissu ein stóran fíggjarligan smeit av hendingini, og tí verður roknað við, at talan verður um heilt stórt endurgjaldskrav.

**-mørk**

# ÍF styrkir sær hópin

**Í royndunum at vinna seg fram á uppflytingarsess hevur ÍF styrkt hópin við trimum spælarum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið frammi, at Knút Vesturtún hevur gjørt av at spæla við ÍF seinnu helvt av kappingarárinum.

Men umframt Knút, sum kemur úr EB/Streymi, hevur ÍF eisini fingið tveir aðrar spælarar.

Viggo Johannesen er upprunaliga úr ÍF, men seinastu tvey kappingarárini hevur hann verið í NSÍ. Hetta kappingarárið hevur hann tó illa havt stundir til Formula-fótbólt og ta venjing, sum hetta krevur, men nú fer hann so at tørna út fyri ÍF.

Tað hevur Helgi L. Petersen eisini. Rituvíkingurin gjørdi í vetur sáttmála við B36, men vaksandi arbeiðsuppgávur í borgarliga starvi hansara gjørdu, at hann illa fekk gjørt somikið nógv við fótbóltin, sum kravið frá høvuðsstaðarfelagnum var. Og tí samdust partarnir skjótt um at strika sáttmálan.